## Broyting í almennu byggisamtyktini fyri Húsa Kommunu

Í sambandi við, at Húsa Kommuna skal gera sparkivøll og bilstøðlapláss, verður fríðøkið í Rúnardali, sum er partur av matrikul nr. 42.a., lagt til kommunalt virksemi.

Møgulig mótmæli, skulu skriftliga, verða kommununi í hendi, í seinasta lagi **31. mars 2007.**

Áhugað kunnu síggja broytingaruppskotið á kommunuskrivstovuni eftir avtalu við ein av bygdarráðslimunum.

**Húsa Kommuna**

## GRØNLAND

M/Tr. Polar Amaroq søger maskinchef og en 1. mester til rejefiskeri ved Vest og Østgrønland.
HM. - effekt er 4500 KW
Fryseri R-22,Spilanlæg Brattvaag

*Tiltrædelse snarligt.*

**Polar Seafood Trawl**
Nuuk
Att: Jens Jørgen Egede
Tlf. 00299 324411
mail: jje@polarseafood.gl

## Eldri sethús, umbygd í 1976/7, til sølu

Húsini standa Norðuri í Sundum í Kollafirði og eru í tveimum hæddum.

Í niðaru hædd eru stova, køkur, gong, durur og kamar við tilhoyrandi wc.

Á loftinum eru 5 kømur, gong og baðiverilsi.

Fýrrúm og hjallur eru bygd føst í húsini.

Húsini hava nýggjan centralvarmaketil, nýggja oljufýring, nýtt aluminiumstak og nýggjan timburklædning.

**Tlf. 421 309 / 251260**

## Íbúð í Vestmanna

Vegna eitt av starvsfólk okkara sóknast vit eftir íbúð.

**Stubbin**
Tlf. 47 18 00

## Mentamálaráðið
YRKISDEPILIN

### SKRIVSTOVUFÓLK

sansir.fo

**Starvið**
Fulltíðarstarv sum skrivstovufólk er leyst at søkja í Mentamálaráðnum.

Talan er um eitt áhugavert og fjølbroytt starv í Yrkisdeplinum við møguleikum fyri fakligari og persónligari menning við skiftandi uppgávum.

**Arbeiðsøki**
Í høvuðsheitum at arbeiða við øllum vanligum fyrisitingarligum uppgávum og at hava skrivligt og munnligt samskifti við viðskiftafólk, t.e. lærupláss, lærlingar, yrkisskúlar, yrkisnevndir og onnur innan arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarøkið.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum, at umsøkjari:
- Hevur handilsskúlaútbúgving og royndir í skrivstovuyrkinum ella aðra javnsetta útbúgving og royndir,
- hevur góðan teldukunnleika og kunnleika til mál, serliga føroyskt, og
- hevur góð samstarvsevni og førleika at arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar – og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.
Setanarøkið fevnir um alt stjórnarráðið og tess stovnar.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

Yrkisdepilin
Postrúm 3279
FO-110, Tórshavn

ella sum teldupostur til: peturoh@yrkisdepilin.fo

Umsóknir skulu vera Yrkisdeplinum í hendi í seinasta lagi 23. februar 2007, kl. 16.00.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Upplýsingar um virksemið hjá Yrkisdeplinum eru at finna á heimasíðuni: www.yrkisdepilin.fo

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, ber til at ringja til Petur Oluf Hansen, fyrisitingarleiðara, tlf. 555066.

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt fyrisitur ráðið uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Yrkisdepilin** er ein sjálvstøðug fyrisiting í Mentamálaráðnum, sum fyrisitur arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarmál, herundir at vera fyrisiting hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndunum. Yrkisdepilin fyrisitur eisini ávís viðkomandi málsøki fyri Mentamálaráðið, herundir at avgreiða ferða- og lønarendurgjald til lærupláss o.l.

## Mentamálaráðið

### STUÐUL ÚR MENTAMÁLARÁÐNUM

sansir.fo

**Stuðul til mentanarlig tiltøk**
Sambært Løgtingslóg nr. 60 frá 17.05.2005 er peningur settur av á løgtingsfíggjarlógini til stuðul til tiltøk og verkætlanir innan mentan og list.
Stuðulin verður játtaður sum verkætlanarstuðul ella annar stuðul til einstaklingar, bólkar ella feløg.

Freistin at søkja er hósdagin 15. mars 2007.

Umsóknir um stuðul til fløgu- og bókaútgávu skulu sendast til Mentanargrunn Landsins.

**Stuðul til barna- og ungdómsarbeiði**
Tann upphædd, ið Mentamálaráðið umvegis sp/f Ítróttarvedding fær burturav veddingarpeninginum, verður nýtt sum stuðul til verkætlanir og tiltøk til gagns fyri børn og ung.
Tey, ið skipa fyri tiltøkum og standa fyri verkætlanum, sum eru børnum ella ungum til gagns, eru vælkomin at søkja.

Freistin at søkja er hósdagin 12. apríl 2007.

**Stuðul til myndlistafólk**
Peningur er settur av á fíggjarløgtingslógini til stuðul fyri myndlistafólk. Listafólk, sum eru undir útbúgving, kunnu søkja. Yrkislistafólk kunnu søkja um stuðul til eftirútbúgving og til námsferðir.

Freistin at søkja er hósdagin 15. mars 2007.

Allar umsóknir eiga at verða skrivaðar á serstakt umsóknarblað til endamálið. Umsóknarbløð og vegleiðingar eru at finna á alnetinum á: www.mmr.fo, ella fáast við at venda sær til:

**Mentamálaráðið**
Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 35 50 50 – Telefax 35 50 55
e-postur.: mmr@mmr.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentanarmál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Mentamálaráðið er skipað í tríggjar deildir – Mentamáladeild, Fólkaskúladeild og Vinnu- og miðnámsskúladeild – umframt ein stáp, sum veitir ráðgeving til deildirnar o.o.